| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**22. november 2007** | Blað nr.: **7196** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 22. november 2007**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 166/07-181/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen
Katrin Dahl Jakobsen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen
Edvard Joensen
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**168/07** **2007-2941**

**Ársfíggjarætlan 2008 fyri Tórshavnar havn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Havnarnevndin 1. oktober 2007:**
**1. viðgerð.**
Samtykt fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við kr. 73.720.000,- og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Einmælt samtykt.

**2. viðgerð:**
**Havnanevndin 12. november 2007:** Nevndin samtykti fíggjarætlanina, ið javnvigar við kr. 73.720.00,-, við 2. viðgerð, og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið við 2. viðgerð.

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**169/07** **<u>2007-2955</u>**

**<u>Uppskot til ársfíggjarætlan 2008 hjá Tórshavnar kommunu</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur tann 27. sept. 2007, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2008, ið javnvigar við tkr. 742 mió. kr.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2008, sum faknevndirnar hava viðgjørt.

**<u>1. viðgerð</u>:**

| **<u>Útreiðslur</u>:** | | | | **2008** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| Konto | 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 23.849.000 | 20.914 |
| - | 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.137.000 | 7.986 |
| - | 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 17.937.000 | 14.413 |
| - | 04 | Kt-deildin | - | 6.084.000 | 4.987 |
| | | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **57.007.000** | **48.300** |
| | | | | | |
| Konto | 11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.997.000 | 17.528 |
| - | 12 | Umhvørvismál | - | 1.850.000 | 1.439 |
| - | 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13.540.000 | 13.181 |
| - | 15 | Renovatión | - | 19.237.000 | 15.805 |
| - | 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 21.230.000 | 17.892 |
| - | 18 | Bussleiðin | - | 16.457.000 | 11.591 |
| - | 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 9.709.000 | 9.063 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.887.000 | 10.400 |
| | | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.907.000** | **96.899** |
| | | | | | |
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50.000 | 100 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 526.000 | 449 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 670.000 | 600 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 403.000 | 380 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.673.000 | 1.536 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.486.000 | 4.076 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 3.577.000 | 3.315 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.189.000 | 4.189 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.017.000 | 2.940 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.694.000 | 3.233 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.449.000 | 3.163 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.951.000 | 4.934 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.670.000 | 6.474 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 5.275.000 | 3.698 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **45.000.000** | **39.087** |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 550.000 | 550 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.764.000 | 6.215 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.974.000 | 5.572 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.030.000 | 3.980 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 9.260.000 | 7.313 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022.000 | 3.750 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **29.600.000** | **27.380** |
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 18.885.000 | 18.010 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.405.000 | 4.305 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 380.000 | 325 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 9.535.000 | 9.250 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 640.000 | 555 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 655.000 | 555 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 | 0 |
| | | Sambýlið í Mattlág | - | 500.000 | 0 |
| | | Dagtilhaldið í Kollafirði | - | 0 | 0 |
| | | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **35.000.000** | **33.000** |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **135.000.000** | **122.254** |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 9.135.000 | 8.565 |
| - | 81 | Sethús kommununnar | - | 0 | 1.000 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 41.000.000 | 38.000 |
| | 63 | Útveganir | - | 4.000.000 | 5.500 |
| | | Nýútvegan av amboðum | - | 3.500.000 | |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 6.500.000 | 6.500 |
| | | Summararbeiði hjá skúlaungdómi- | - | 2.000.000 | 2.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **66.135.000** | **61.565** |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **3.000.000** | **3.000** |
| | | **Rakstrarútreiðslur íalt** | **kr.** | **484.649.000** | **431.485** |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 251.800.000 | 150.000 |
| | | Smábátahavn | - | 5.000.000 | 5.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **741.449.000** | **586.485** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 1.000.000 | 1.403 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 0 | 2.296 |
| - | 67 | Tórshavnar Havn | - | 0 | 0 |
| | | **Lánsgjøld og grunnar** | **kr.** | **1.000.000** | **3.699** |
| | | | | | |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **742.449.000** | **590.184** |

**Inntøkur:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 4.000.000 | 1.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000.000 | 3.000 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 583.000.000 | 536.133 |
| | | At fíggja við tøkum peningi/lántøku | - | 152.449.000 | 50.000 |
| | | | | | |
| | | **Inntøkur íalt** | **kr.** | **742.449.000** | **590.133** |

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Minnilutin, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, boðaði frá, at hann tekur støðu á seinni fundi, og at hann vil koma við einum broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**2. viðgerð**

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Útsett til eykafundin.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin ger vart við, at broytingaruppskot kunnu koma til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til við 2. viðgerð at hækka konto 18 bussleiðin við kr.

600.000 og konto 39 ymsir studningar við kr. 600.000 og at lække konto 90 íløgur við kr. 1.200.000.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**- Tilmælið frá meirilutanum er arbeitt inn í omanfyristandandi útreiðslur.**

**Býráðið 22. november 2007:** Minnilutin, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, heldur, at raktstrarútreiðslurnar eru hækkaðar alt ov nógv og metur, at rætt er at tálma hendan vøkstur nakað.

Eisini heldur minnilutin, at tað er óforsvarligt og órealistiskt at seta so nógv av til íløgur, serliga tá ætlanin er at gera hesar við at læna um 100 mill. kr.

Minnilutin heldur, at tað er skeivt, at býráðið, ið góðum tíðum, aftur vil skuldarbinda kommununa. Minnilutin mælir tí til at broyta fíggjarætlanina soleiðis, í 1.000 kr.:

**Fíggjarætlan 2008.**

Minnilutin mælir til:

| | |
|---|---|
| **At lækka:** | |
| 01 Miðfyrisitingin | 2.000 |
| 02 Trivnaðarfyrisitingin | 500 |
| 03 Tekniska fyrisitingin | 2.000 |
| 04 KT-deildin | 500 |
| 15 Renovatión | 1.000 |
| 16 Asfalt og ferðsla | 2.000 |
| 18 Bussleiðin | 4.000 |
| 38 Fríðkan av býnum | 1.000 |
| Nýútvegan av amboðum | 1.000 |
| Reguleringskonto | 1.000 |
| Íløgur | 85.449 |
| **Íalt** | **100.449** |
| | |
| **At hækka:** | |
| Barnafrádráttin við kr. 500 pr. barn. til 6.000 kr. pr. barn | 3.000 |
| **Nettolækking** | **97.449** |
| | |
| **Og at lække:** | |
| Fíggja við tøkum peningi/lántøku, soleiðis at ikki er neyðugt við lántøku. | 97.449 |

**Henda broyting gevur**

**Útreiðslur**

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 469.649 |
| Íløgur | 166.351 |
| Smábátahavnir | 5.000 |
| Lánsgjøld | 1.000 |
| **Útreiðslur íalt** | **642.000** |

**Inntøkur**

| | |
|---|---|
| Rentuinntøkur | 4.000 |
| Inntøkur av traðum og økjum | 3.000 |
| Skattainntøka | 580.000 |
| At fíggja við tøkum peningi | 55.000 |
| **Inntøkur íalt** | **642.000** |

ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**170/07** **2006-2955**

**Fíggjarætlan 2007- eykajáttanir.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

**a.** Við árslok 2006 vóru tilsamans 82.894 tkr. fluttar fram sum ikki brúkt játtan. Broytingin er rakstrarførd undir serligum upphæddum í roknskapinum 2006 og sett upp undir eginognini. Upphæddin kann sundurgreinast soleiðis:

Deildir undir blokkskipanini – sí granskoðaraprotokoll síða 227, pkt. 5.2

| Endamál | Hækking á konto | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Vegir og gøtur | 11 | tkr. | -636 |
| Umhvørvismál | 12 | - | 325 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | -93 |
| Brennistøðin | 15 | - | 5.384 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | -597 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 2.152 |
| Hests skúli | 20 | - | 46 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -54 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -17 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 115 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -952 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 316 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 48 |
| Eysturskúlin | 27 | - | -488 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 64 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | -159 |
| Argja skúli | 30 | - | 177 |
| Býarsavnið | 34 | - | 396 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 836 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -350 |
| Stadionøkið | 37 | - | 2.129 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | -133 |
| Heilsumál | 41 | - | 215 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 731 |
| Dagtilhald í Nólsoy | 44 | - | 105 |
| Nýútveganir | 63 | - | 4.007 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Íløgustuðul | 64 | - | 5.794 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | 8.661 |
| Sethús | 81 | - | 1.256 |
| Onnur hús | 82 | - | -4.756 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 3.164 |
| Íløgur | 90 | - | 51.959 |
| Barnaansing | | - | 3.249 |
| Framfluttar játtanir íalt frá 2006 | tkr. | | 82.894 |

b. **Eykajáttanir í 2007 av reguleringskonto:**

| | | |
|---|---|---|
| Arksam, endurgjald, 2001-2690 | tkr. | 255 |
| Kollafjarðar skúli, 2006-3428 | - | 480 |
| Gl. kirkjugarður á Argjum, 2006-1723 | - | 50 |
| Umhvørvisvikan, 2007-0467 | - | 80 |
| P/F Mark, endurgjald, 2000-3250 | - | 150 |
| WC í Mylnugøta, 2007-0064 | - | 300 |
| Inni á Gøtu, endurgjald, 2003-1470 | - | 248 |
| Skálatrøð, heildarætlan, 2007-1042 | - | 800 |
| Hegn á Hvítanesi, 2000-1630 | - | 180 |
| Játtað av reguleringskonto íalt | tkr. | 2.543 |

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**171/07** **<u>2007-2348</u>**

**<u>Umsókn um broyting av byggisamtyktini á Argjaboða.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í umsókn dagf. 21. august 2007, søkja eigararnir av ognunum niðan fyri vegin á B3 økinum á Argjaboða um, at byggisamtyktin verður broytt frá B3-vinnuøki til C3-øki til miðstaðaendamál.

Í ásetingunum fyri B3-økið stendur m.a. "*Loyvt er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at gera bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.*"

Tað eru trý virkir í økinum, sum øll liggja niðan fyri vegin. Tey eru P/F Sveipur, Sp/f 25. februar 1998 og Sp/f Hentze BK. Harav er tað bert P/F Sveipur, sum hevur eina framleiðsluvinnu. Teir framleiða kassar til fiskaútflutning.

Samstundis biðja umsøkjararnir um, at avtala verður gjørd um eina yvirgangstíð har verandi vinnuvirkir verða avvikslaðið.

Ognin omanfyri vegin liggur eisini sum B3-øki, men her er eingin bygningur.

Eftir áheitan frá eigaranum, Meinhard Dam, samtykti býráðið 23. apríl 2007, at broyta ásetingina fyri økið til C3-øki, (j.nr. 2003-1602) hendan umsókn er ikki endaliga viðgjørd í Innlendismálaráðnum enn.

Ein av grundgevingunum hjá TK fyri at gera hesa broytingina var, at man ikki ynskir meira vinnuvirksemi á Argjaboða, tí at øll til- og frákoyring við møguligari tungari ferðslu, skal koyra eftir einum smølum vegi har nógv fólk búgva framvið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina í almennu byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**172/07** **<u>2006-1856</u>**

**<u>Útstykking í Nólsoy</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Av tí at fólk í Nólsoy hava spurt seg fyri hjá kommununi um grundstykki og hava fingið at vita, at eingin útstykking verður framd í bræði, vilja staðbundnu limirnir hava greitt at vita, hvørjar ætlanir kommunan hevur hesum viðvíkjandi.

Eisini vilja teir vita, hvussu er við ætlanini um randarhús og um til ber at keypa grundstykki uttan fyri hesa ætlan.

**Nólsoyarnevndin 13. juni 2006:** Nevndin mælir plandeildini til at gera eina útstykkingarætlan fyri økið, sum liggur oman fyri barnagarðin.

Kommunan eigur lendið, matr. nr. 159e.

**Ískoyti:**
Málið liggur í byggi- og býarskipanardeildini.

**Nólsoyarnevndin 12. september 2006:** Kunna varð um, at málið kemur fyri á fyrst komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Í Byggisamtyktini fyri Nólsoy, kapittul IV § 18. øki A:Sethús stendur:

*Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri serhús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at útstykking verður samtykt sambært korti nr. 2006-1856/3 og send út til projekteringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projekteringina av útstykkingini út. Sí hjálagt yvirlit yvir innkomin tilboð.

**Býráðið 22. november 2007:** Tikið av skrá.

**173/07** **2006-3154**

**Kjølsvín til smábátar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært máli j.nr. 2002-0712 ‘ oljudálking á Havnarvág’ er Havnarvág illa dálkað. Tórshavnar kommuna (TK) hevur sett ymisk tiltøk í verk fyri at basa dálkingini, millum annað kann nevnast málið ‘ Tórshavnar Skipasmiðja’ , j. nr. 2003-0371, har TK hevur sett krøv til útlát frá bedingini og málið ‘ Reinsan av Vestaru vág’ , j. nr. 2004-1759, har alt spillvatn verður burturbeint frá vágni. Ein onnur dálkingarkelda eru smábátar, sum liggja á vágni, har tiltøk eiga verða sett í verk fyri at avmarkað dálkingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heitt verður á havnanevndina um at útflýggja smábátum eitt kjølsvín um árið at fíggja av havnagjaldi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. oktober 2007:** Nevndin samtykti at heita á havnanevndina um at broyta reglugerðina fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, soleiðis at skipan fyri kjølsvín verður sett í verk.

Somuleiðis samtykti nevndin at mæla býráðnum til at heita á Innlendismálaráðið at seta í gildi kunngerð um nýtslu av kjølsvínum til smábátar við heimild í Havumhvørvislógini.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

Eitt ískoyti til §1 í reglugerðini fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu kundi verið:

Stk. 7 *Fyri at hindra at olja verður latin á sjógv, er tað skylda hjá øllum bátaeigarum at hava eitt nøktandi kjølsvín liggjandi í kjølinum.*

Boytingin í reglugerðini kemur í gildið 1. januar 2008.

**Havnarnevndin 12. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum, tó so at orðingin í stk. 7 verður soljóðandi:

*"Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv, er tað skylda hjá øllum bátaeigarum at hava eitt nøktandi kjølsvín liggjandi í kjølinum."*

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

174/07 **2006-1899**

**Útstykking fram við miðstaðargøtuni Karlamagnusarbreyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at Karlamagnusarbreyt verður miðstaðargøta í Hoyvík, eru løgd vinnustykki fram við vegnum á báðum síðum. Serstaka byggisamtyktin fyri økið lýsir hesi vinnustykki og økið sum heild.

Ætlanin er, at vinnustykkini skulu verða klár at byggja á um umleið eitt ár.

Arbeiðið, sum higartil er gjørt, og sum er í gongd í løtuni, er gerð av vegi, leiðingum og partvís tillagan til verandi lendi. Ætlanin er, at øll byggiøkini fram við Karlamagnusarbreyt skulu gerast byggibúgvin eisini, áðrenn eigarar av stykkinum sleppa inn á økið við miðstaðargøtuna.

Fyri at stytta um tíðina, til fyrstu eigararnar av vinnustykkjunum sleppa inn á økið at byrja bygging, er ætlanin at deila arbeiðið við at útstykkja vinnustykkini upp í minst tvær arbeiðstøkur. Eina, ið byrjar frá Torginum niðast, og eina arbeiðstøku sum byrjar uppi frá Rólantsgøtu. Møguleiki er fyri at deila seinnu arbeiðstøkuna upp enn eina ferð, um hetta verður mett ræ ttast, tá ið projekteringsarbeiðið er komið longur.

Niðara arbeiðstøkan liggur tætt uppat nýggju útstykkingini eystanfyri Karlamagnusar-breyt, eisini nevnd ‘ 200’ . Tað er tí týdningarmikið, at henda arbeiðstøka fer fyrst í gongd, um alt ikki verður gjørt samstundis.

Projekteringsarbeiðið eigur at verða gjørt fyri øll vinnustykkini undir einum, við møguleika fyri 2 ella 3 útbjóðingum, sum støða kann takast til seinni.

**Tilmæli:**
Býararkitekurin mælir til at játta verður peningur til projektering av allari útstykkingini, ið liggur fram við miðstaðargøtuni Karlamagnusarbreyt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Samtykt at leggja út pening til projektið.

- Ískoyti til málið viðv. innkoyringum til ‘ Útstykking 200’ frá Karlamagnusarbreyt.

Sambært Kap. V, § 2, b og c í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu vegir millum býlingar verða avlagdir í 12,5 m breidd, av hesum til akbreyt 7,5 m og vegir í býlingi verða avlagdir í minst 10,0 m breidd, av hesum til akbreytir 6,0 m. Byggivaldið kann tó loyva, at til vegir, ið eftir meting tess ikki fara at hava ferðslutýdning, verður avlagda breiddin sett niður í 8,0 m, av hesum til akbreyt 6 m.

Vísandi til hetta, skal innkoyringin til ' Útstykkingina 200' frá Karlamagnusarbreyt verða 12,5 m ella 10 m breiður.

Orsakað av, at Karlamagnusarbreyt er ein miðstaðargøta, verður Karlamagnusarbreyt ferðsluliga ein seyrigøta við súkklubreyt og gonguteigi. Samlaða breiddin fyri Karlamagnusarbreyt er 10 m.

' Útstykkingin 200' er skipað soleiðis, at vegirnir enda har Túnini í ' Útstykking 200' byrja. Á Túnunum (felagsøkjunum) og í útstykkingini annars, verður bilaferðsla raðfest niðarliga, soleiðis at uppihald og spæl í felagsøkjunum verður uppá treytirnar hjá fólkum og ikki bilum.

Teinurin á innkoyringunum, ið talan er um, (tær eru tríggjar í tali) millum Karlamagnusarbreyt og Túnini í ' Útstykking 200' er uml. 30 m. Samlaða breiddin á hesum 3 innkoyringum er ávíkavist 10 m (niðasta innk.), 9,9 m (mið innk.) og 14,9 m (ovasta innk.). Akbreytin á hesum vegum er ætlað at verða 5 m, ið er sama breidd sum Karlamagnusarbreyt.

Hesar innkoyringar verða ein partur av samlaðu heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt, sum fyriskrivað í Serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at akbreytin millum Karlamagnusarbreyt og ' Útstykking 200' , verður 5 m breið. Hetta tí, at talan er um eina seyrigøtu og miðstaðargøtu, har ferðslan ikki er eins og á veganetinum annars. Hetta at frávik verða frá Almennu byggisamtyktini, hvat viðv. ferðslu og bygging, verður mett at verða neyðugt, fyri at kunna gera eina miðstaðargøtu við øðrvísi raðfesting av koyrandi-, súkklandi- og gangandi ferðslu á Karlamagnusarbreyt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 4. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Licitatión var 10. oktober 2007 og inn komu tilboð frá 5 ymiskum arbeiðstakarum. Tilboðini vóru rættiliga ymiskt men miðal passaði væl við metingina hjá ráðgevanum, ið var 30.500.000.

Innkomin tilboð:

| | |
|---|---|
| H.V. Lutzen P/F | 41.179.914 |
| J. & K. Petersen | 34.980.882 |
| - alternativ 1 | 33.180.882 |
| - alternativ 2 | 28.980.882 |
| Articon | 28.874.671 |
| - alternativ | 25.474.671 |
| Samtakið Hansen & Jakob. | 26.265.223 |
| Guttesen & Staksberg | 23.571.146 |

Guttesen & Staksberg hevði lægsta tilboðið áljóðandi 23.571.146 uttan MVG.

Við lægsta tilboðnum sum útgangsstøði er samlaði kostnaðurin fyri planering, íroknað prosjekt, eftirlit, byggileiðslu, ókent, MVG v.m. sambært skjal 2006-1899/12, mettur til kr. 29.927.989,44.

Umsitingin er í ferð við at eftirkanna tilboðini og onnur viðkomandi viðurskifti..

**Tilmæli**
Tekniski stjórin mælir til at tikið verður av lægsta tilboðnum hjá Guttesen & Staksberg og at játtaðar verða kr. 29.927.989,44 til gerð av vinnustykkjum framvið Karlamagnusarbreyt, og at málið verður beint til teknisku nevnd og býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at leggja kr. 30.000.000 fyri samlaða kostnaðin av verkætlanini og at taka av lægsta tilboðnum hjá Guttesen & Staksberg uppá 23.571.146 uttan MVG.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

175/07 **2006-3223**

**Tórshavnar kommuna og Erling Jonannesen: Marknaumskipan millum matr. 1214a og 1215a, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við útstykkingarætlanina á matr. nr. 1215a hjá Erlingi Johannesen, hevur TK ætlanir um at gera ein almennan gongurætt frá Marknagilsvegum og niðan til komandi útstykkingarvegin úr Dánjalstrøð og eystureftir. Núverandi gongurættur frá Marknagilsvegnum og niðan til kommunalt øki er fram við vesturmarkinum á matr. nr. 1215a. Tí er neyðugt at gera makaskifti millum matr. nr. 1214a og 1215a, Tórshavn.

Økið hjá TK er uml. 259m² til støddar, sí tekning (j. nr. 2006-3223/1). Økið hjá Erlingi Johannesen er uml.196$m^2$, sí tekning (j. nr. 2006-3223/2). Erling Johannesen ynskir at makaskifta 196$m^2$ við TK og keypa umleið 63$m^2$, sum er munurin millum 259$m^2$ og 196$m^2$.
Málið verður lagt fyri teknisku nevnd tann 2. november 2006.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Marknaumskipanin millum ognina hjá Erling Johannesen, matr. nr. 1215a, og ognina hjá Gullak Madsen, matr. nr. 1216a, sí TK j. nr. 2007-2656, hevur tað fylgju, at marknaumskipanin millum ognina hjá Erling Johannesen, matr. nr. 1215a og ognina hjá Tórshavnar kommunu, matr. nr. 1214a, má broytast nakað í mun til nevndarsamtyktina í B&B 30. oktober 2006. Umsigingin hevur gjørt eina nýggja tekning, sum lýsir broytingina, sí TK j. nr. 2006-3223/4.
-

Broytingin inniber at Tórshavnar kommuna kemur at lata Erling Johannesen uml. 294m² ístaðin fyri 259m².

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at taka undir við ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**176/07** **2007-0585**

**Sóttreinsing við klor av drekkivatni í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Góðskan á drekkivatninum í Tórshavnar kommunu hevur ikki verið nøktandi tað síðsta árið. Støðugt hava verið ávístar bakteriur í vatninum, sum kunnu vera sjúkuelvandi. Heilsufrøðiliga starvstovan og virkir í kommununi hava eftirlýst sóttreinsing av drekkivatninum við klori.

Støða skal verða tikin til hvørs umsitingin skal fara undir at sóttreinsa drekkivatnið við klori.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umsitingin í samstarvi við Heilsufrøðiligu starvsstovuna, letur gera mannagongd viðvíkjandi sóttreinsing við klori av drekkivatninum í kommununi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

- Sambært norskum forskriftum og vísandi til serfrøðingar á drekkivatnsøkinum, er ikki tilráðiligt at reinsa drekkivatn bæði við UV-filtrering og klor, tá hesi virka á sama hátt.

Rátt verður til at hava tvær reinføris forðingar, sum eru óheftar av hvørjari aðrari tvs. tær virka á tveir ymiskar mátar, soleiðis at UV filtrering verður kombinerað við eini fysiskari forðing, t.d. filtrering, umvendari osmosu ella flokkulering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heitt verður á teknisku nevnd um at skipa verður fyri, at UV filtrering verður kombinerað við eini fysiskari forðing.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Útgerð til flokkulering av drekkivatni er tøk í Villingadali. Í Havnardali er útgerðin ov gomul til at tað fíggjarliga er ráðiligt at seta flokkulering í verk, harumframt er nýtt vatnverk projekterað og væntast liðugt um eini 2 ár (sí j. nr. 2004-0389). Tí kundi heldur verið skipað fyri betri reinsan av sandfiltrum og betri UV-stráling.

Fyribils kostnaðarmeting:

| | |
|---|---|
| Villingadalur – árligur rakstur: | kr. 250.000 |
| Havnardalur – UV-stráling: | kr. 150.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatndeildini mæla til at skipað verður fyri flokkulering av vatninum í Villingadali og nevndu ábøtur í Havnardali.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum og at hækka játtanina við kr. 150.000,- afturat til UV-stráling í Havnardali og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Nýtt tilmæli : Tekniski stjóri og leiðarin fyri vatn- & gøtuljósdeildina mæla til keypa nýggja UV-stráling og at játta kr. 300.000 av konto 90-1014-14900 (Vatnbyrging í Kollafirði).

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 300.000 av íløgum.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**177/07** **2007-3168**

**Tyrvingarplássið í Húsahaganum: Útbygging 4. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Seinasta útbygging av tyrvingarplássinum í Húsahaganum, 3. byggistig, er um at verða liðug, og vil henda geva tyrvingarkapasitet til uml. 1 ár.
Dálkaðu moldnøgdirnar, ið komu frá rennibreytini, hava fylt munandi meira enn mett var, og blivu hesar tilsamans uml. 13.000 m³.

Neyðugt er tí beinanvegin at fara undir 4. byggistig til tess at nøkta tørvin, til tyrvingarplássið á Glyvurnesi verður klárt. Har skulu gerast árinskanningar og aðrar tekniskar kanningar, áðrenn arbeiðið kann setast í gongd.

Hetta 4. byggistig fevnir um restina av tøka økinum innan fyri kontrolleraða tyrvingarøkið í Húsahaganum, og væntast at geva ein tyrvingarkapasitet á uml. 40-45.000 m³. Við vanligum nøgdum svarar hetta til uml. 3-4 árs kapasitet.

Ein fyribils kostnaðarmeting sigur, at 4. byggistig vil kosta millum 6,2 og 7,7 mió. kr.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Útbyggingin av 4. byggistigi er ætlað fíggjað á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Avlopsjáttan frá 3. byggistigi | kr. 1,5 mió. |
| Avsett á fíggjarætlan fyri 2008 | kr. 3,0 mió. |
| Flyting av játtan til Glyvurnes 2007 | kr. 0,5 mió. |
| Mett inntøka av sølu av avlopsgróti | kr. 2,7 mió. |
| Tilsamans kr. | kr. 7,7 mió. |

Sølan av gróti er treytað av góðkenning og avtalu við Búnaðarstovuna um avgjald v.m. Miðað verður eftir at nýta upp til 48.000 m³ av gróti í aðrari kommunalari verkætlan, umframt at nakað av grótinum skal nýtast til arbeiðsvegir á tyrvingarplássinum.

Umsitingin greiðir nærri frá málinum á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á KB mæla til, at nevnda útbygging verður boðin út beinanvegin við innheintan av undirhondsboðum frá 2 arbeiðstakarum, og at arbeiðið verður fíggjað sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Tekniska nevnd 22. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út til tveir arbeiðstakarar at geva undirhondsboð, og var úrslitið hetta:

| **Arbeiðstakari:** | **Tilboð:** |
|---|---|
| P/F J & K. Petersen | kr. 6.514.637,- |
| Sp/f Andrias Berg Entreprenørur | kr. 6.897.925,- |

Ráðgevi kommununar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum (skjal 2007-3168/9).

Umsitingin hevur somuleiðis havt samband við Búnaðarstovuna um avgjald fyri tann partin av grótinum, sum verður selt av økinum, og verður prísurin helst tann sami sum fyri grótbrotið á Glyvursnesi, men við prístalsregulering.

Grundað á lægsta tilboðið er gjørd nýggj kostnaðarmeting, og er samlaði kostnaðurin, íroknaður prosjektering, eftirlit, ókent, avgjald fyri grótið og mvg, mettur til kr. 8.058.700,58 (skjal 2007-3168/12), sum umsitingin mælir til at fíggja soleiðis:

| | |
| --- | --- |
| Avlopsjáttan frá 3. byggistigi | kr. 1,5 mió. |
| Avsett á fíggjarætlan fyri 2008 | kr. 3,0 mió. |
| Flyting av játtan til Glyvurnes 2007 | kr. 0,5 mió. |
| Inntøka av sølu av um. 43.000 m³ av avlopsgróti | kr. 3,1 mió. |
| Tilsamans kr. | kr. 8,1 mió. |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á KB mæla til:

- At tikið verður av lægsta tilboðnum frá J & K Petersen, og at játtaðar verða 8,1 mió. kr. til arbeiðið, at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti.
- At umsitingin fær heimild at gera avtalu um sølu av gróti til aðrar kommunalar verkætlanir samsvarandi omanfyri standandi yvirliti.
- At avtalan við Búnaðarstovuna, um avgjald fyri grótið, sum verður selt til nýtslu uttan fyri tyrvingarplássið í Húsahaganum, verður góðkend.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 3.000.000 av íløgum í 2008.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. november 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á KB.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**178/07** **2004-1118**

**Licitatión - Endurnýtslan á Hjalla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Heilsu- og umhvørvisnevndin samtykti hin 5. februar 2004 at játta kr. 1,0 mió. av íløgum 2004 til gerð av bygningi til móttøku, viðgerð og goymslu av serliga dálkandi burturkasti á endurnýtsluni á Hjalla, sí j. nr. 200400104.

Tørvurin á einum slíkum bygningi er eyðsýndur. Núverandi umstøður til vandamikið burturkast eru ikki nøktandi og liva ikki upp til nútíðar krøv, ið avvarðandi myndugleikar seta til tílíkt virksemi. Nevnast kann, at bæði Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Arbeiðseftirlitið hava átalað umstøðurnar til vandamikið burturkast.

Tekniska fyrisitingin hevur saman við Arkitektavirkinum Magnusi Hansen gjørt projektuppskot til ein bygning, ið hevur hesar funktiónir:

- Móttøka, viðgerð og goymsla av vandamiklum burturkasti.
- Pláss til at avskipa serligt burturkast (vandamikið, elektronikk o.t.).
- Amboðsgoymsla.
- Kundamóttøka/kontrollsentur, har ið skráseting/gjalding fer fram.
- Skrivstovupláss til plássleiðaran.
- Fólkarúm, so sum tekøk, toilett, skiftirúm, baðirúm, reingerðarúm.
- Skrivstovuhøli til fyrisiting (leiðaraskrivstova, trý skrivstovupláss, fundar-/frálæruhøli, toilett og matstova).

Byggingin verður mett at kosta íalt kr. 5,9 mió., alt íroknað, eisini 6,25% mvg. Og kr. 5,4 mió. tá innrættingin av ovaru hæddini ikki er við.

Hjálagt er projektuppskot frá Magnusi Hansen, j. nr. 200401111-1, tekningar dagfestar 15. apríl 2004.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til:

<u>at</u> taka undir við projektuppskotinum
<u>at</u> nýta uml. kr. 700.000 av tí sum er framflutt frá íløgunum 2003 (sum játtað varð til liðuggerð av endurnýtsluplássinum) til arbeiðið, soleiðis at tað verða kr. 1,7 mió. tøkar í ár.
<u>at</u> alt verður bjóðað út í senn í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku, uttan innrætting av ovaru hædd til skrivstovuhøli.
<u>at</u> heita á fíggjarnevndina um at játta restina kr. 3,7 mió.

Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004: Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, tó so, at heitt verður á fíggjarnevndina um at taka hædd fyri restkostnaðinum við komandi fíggjarlógarviðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodna licitatión millum hesar arbeiðstakarar:

- Articon, P/F, Tórshavn
- J & K Petersen, P/F, Tórshavn
- Guttesen og Staksberg, PF, Tórshavn
- Karstin A. Joensen, Sp/F, við Sjógv, Kollafjørður

- ÁTS, Sp/F, v/Karstin Vang, Kaldbak

Licitatiónin er ásett at verða 31. januar 2005, kl. 15.00.

Tilmælið verður sent limunum frammanundan fundinum ella framlagt á fundinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Útsett.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. mars 2005:** Kunnað varð um gongdina í málinum. Umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við at gera uppskot til broyttan bygning, ið lýkur fíggjarligu treytirnar, sambært avtalu við ráðgevan.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. apríl 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við broyttar fíggjarligar raðfestingar í kommununi, verða fleiri av teimum ætlaðu út- og umbyggingunum við brennistøðina á Hjalla útsettar. Orsakað av hesum hevur leiðslan valt at gera nakrar umprioriteringar á økinum hjá brennistøðini á Hjalla.

Eitt úrslit av hesum er m.a., at goymslan av dálkandi burturkasti kann verða í høllini við síðuna av siloini og mett hevur verið, at rættast er at bíða við at gera skrivstovuhølini, sum ætlanin var at gera á ovaru hæddini í bygninginum til endurnýtsluna.

Uppskotið frá bygginevndini er tí, at ein øðrvísi bygningur enn fyrr ætlað verður bygdur á endurnýtsluplássinum.

Bygginevndin hevur gjørt uppskot til eina nýggja byggiskrá, sum verður løgd fram á fundinum.

Í sáttmálanum við ráðgevandi arktektin stendur m.a., ”um veruligi kostnaðurin víkir meira enn 10% frá kostnaðarmetingini, hevur ráðgevin, uttan eyka samsýning, skyldu til at broyta projektið, so frávikið ikki verður meira enn 10%”.

Men um samtykt verður at byggja ein annan bygning, verður tað torført at gera hetta kravið galdandi. Hetta tí at tað er ein onnur uppgáva at formgeva ein nýggjan bygning enn at broyta og skera burtur av einum verandi projekti.

Uppskotið frá bygginevndini er at taka upp samráðingar við ráðgevaran um at gera eitt skitsuprojekt til ein nýggjan bygning fyri ein hóskandi tímasats og bjóða Guttesen og Staksberg, sum vunnu lisitatiónina, við í eitt samarbeiði at detailprojektera og byggja nýggja bygningin fyri ein frammanundan avtalaðan kostnað.

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við nýggju byggiskránni, og at bygginevndin tekur upp samráðingar við Magnus Hansen, ark., og Guttesen og Staksberg um í samarbeiði at byggja nýggja bygningin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. september 2005:** Málið var umrøtt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur nú havt samráðingar við Guttesen & Staksberg um gerð av broyttum bygningi sambært nýggjum skitsuprojekti hjá Magnusi Hansen, ark., ið er gjørt við støði í endurskoðaðu byggiskránni.

G&S vil gera bygningin fyri beint undir 4,5 milliónir uttan MVG.

Fíggjarætlanin sær soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Tilboðsupphædd | kr. | 4.500.000 |
| Óvæntað og møguligar broytingar | - | 450.000 |
| Projektering | - | 713.250 |
| Samlað uttan MVG | kr. | 5.663.250 |
| | | |
| Samlað við 6,25% MVG | kr. | 6.017.203 |
| | | |
| Innbúgv meting uttan MVG kr. 100.000 | | |
| | | |
| Innbúgv meting við 6,25% MVG | kr. | 106.250 |
| Tilsamans við 6,25% MVG | kr. | 6.123.453 |
| Íløgur játtaðar í 2003 og 2004 | | |
| Framflutt tilsamans | - | 1.700.000 |
| Neyðug játtan til íløgu | kr. | 4.423.453 |

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla nevndini til:

at góðkenna nýggja projektið, og at sáttmáli verður gjørdur við Guttesen og Staksberg um at gerð av bygninginum.

at heita á býráðið umvegis fíggjarnevndina um at játta kr. 4.423.453 av íløguætlanini í 2005 og 2006.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og býararkitektinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Bygningurin bleiv avhendaður 28. februar 2007 við nøkrum manglum, sum nú eru gjørdir.

Í sambandi við byggingina var neyðugt at gera nakrar broytingar og eykaarbeiðir, sum ikki var tikið hædd fyri í projektinum og nøkur eykaarbeiðir sum brennistøðin ynskti fyri at betra um nýtslumøguleikarnar av bygningum og arbeiðsgongdir á brennistøðini.

Óvæntaði eykaarbeiðir eru t.d.

- Flyting av innstalatiónum frá skúri til bygning var munandi størri enn vænta
- Neyðugt var at byggja eitt ventilatiónshús á takinum fyri at fáa pláss fyri ventilatorum.

Eykaarbeiðir sum brennistøðin ynskti eru t.d.

- Ein gongubreyt við kantsteinum er gjørd rundan um allan bygningin fyri at økja um trygdina, soleiðis at starvsfólkið á endurnýtsluni kunnu ganga ótarnað á økinum, og fyri at verja bygningin ímót ákoyring frá bilum.
- Vatnleiðingar og spulikranar fram við báðum síðum av bygninginum, fyri at lætta um arbeiðsgongdina tá ið økið skal haldast reint.
- Tann parturin av bygninginum, ið var ætlaur sum eitt hálvtak til goymslu av tunnum o.t., er innilukkaður og verður nú nýttur til móttøku av elektroniskum burturkastið o.ø., sum helst skal verða undir takið.

| | |
|---|---|
| Samlaðu eykaarbeiðuni kostaðu | kr. 1.120.510,10 við 6,25% MVG |
| Eftir av játtan fyri eykaarb. | kr. 496.025,00 við 6,25% MVG |
| Restar í | **kr. 624.485,10 við 6,25%MVG** |

Leiðarin á brennistøðini mælir til at henda upphædd verður fíggja av játtanini til umvæling av fyrisitingarhølunum í gula bygninginum. Í fíggjarárinum 2007 eru avsettar tkr. 1.228 á kto 15 til hetta endamál, men arbeiðið er ikki byrjað enn, og er játtanin tí

ikki nýtt. Sum avleiðing av hesi flyting verður umvælingararbeiðið minni enn ætlað av fyrstan tíð, meðan tað sum so restar í kann verða gjørt seinni, um fígging verður tøk.

Afturat hesum koma príshækkingar í byggitíðini uppá **kr. 280.676,61 við 6,25%** MVG.

**Tilmæli:**
1. Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á brennistøðini mæla til, at nevndu eykaarbeiðir (kr. 624.485,10 við 6,25% MVG) verða fíggja av konto 15.
2. Bygginevndin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 280.676,61 við 6.25% MVG av íløgum afturat til príshækkingar.
3. At beina málið í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 281.000 av íløgum í 2007.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**- Nú fóru Sjúrður Olsen og Jan Christiansen av fundi.**

**179/07** **<u>2004-1528</u>**

**<u>Broyting av viðtøkum hjá Grunninum Føroya Sjósavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Grunnurin Føroya Sjósavn hevur samtykt at broyta § 11, stk. 2 í viðtøkunum, soleiðis at stykkið fær soljóðandi orðaljóð:

„Er fæ framvegis eftir, tá allir kravánararnir hava fingið tað teimum tilkemur, verður restin at falla Fiskirannsóknarstovuni ella øðrum stovni í lut at nýta til maritimt granskingarendamál í Tórshavnar kommunu.“

Orsøkin til broytingina er, at Toll- og skattstovan ikki kann veita grunninum skattafrælsi, um fæ grundsins skal falla aftur til Tórshavnar kommunu við avtøku. Hetta orsakað av tí sonevndu ”arms length” høvuðsregluni, tí tað er Tórshavnar kommuna, sum hevur latið stovnsfæið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini, sum kemur á fundin at greiða frá málinum, mælir til at góðkenna broytingina.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá leiðaranum á løgdeildini.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**180/07** **2004-0214**

**Nýggjur fólkaskúli við Løgmannabreyt.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

at orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
at útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
at vísa á prinsipployssnir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða byggingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá
4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sambært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina brutto gólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarna-tannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

1) at verkætlanin verður gjørd í ”partnering”.

2) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

3) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

4) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í størsta mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

5) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

6) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
Eitt umboð fyri arkitektin,
Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
Eitt umboð fyri entreprenørin

7) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

8) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

9) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørdur á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekteringsarbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

**1. Inngangur**
Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir árskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir bygningina. Tí verður arbeitt

við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaárinum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

**2. Grundøki**

Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 m².

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**

Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: "at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna."

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, stødd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til "heimsrustir", sum umfata:

- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**

Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.

Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**

Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna hevur víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: “*So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.*”

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
|---|---|
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøki og fyrisiting | 1.608 m² |
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |
| Bruttostødd tilsamans | 5.450 m² |

**4. Byggitøkni**
Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarka íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum léttar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóðdoyving. Loftini eru klødd við ljóðdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

**5. Tíðarætlan**
Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2*, til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

**6. Kostnaður**

Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

**5.450 m² av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.**

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**

Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

Mentamálanevndin 30. juni 2004: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 25. september 2003 at taka undir við mentamálanevndini, at kommunan fór at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum.

Grundarlagið undir samtyktini var, at mentamálanevndin á fundi 25. september 2002 samtykti, at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt, at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan. Eisini fara næmingarnir í Kollafirði í 8. og 9. fl. at vera í skúlanum í Kollafirði.

Í sambandi við avgerðina um at hava framhaldsdeild í Hoyvík og Kollafirði verða skúlastovur tøkar á Eysturskúlanum, sum gevur møguleikar at víðka og menna samstarvið í 10. flokkunum. Næmingarnir úr Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði fara at ganga í 10. flokki á Eysturskúlanum, men talan kann eisini verða um at víðka samstarvið at fevna um aðrar skúlar.

Í skrivi, dagfest 6. apríl 2004, frá Mentamálaráðnum til Tórshavnar kommunu um 10. flokk sigur Mentamálaráðið m.a.

” Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, ið skrivaði Álit um nýggja fólkaskúlalóg í 1997, sum er grundarlagið undir verandi fólkaskúlalóg, hevur m.a. víst á, at tað hevði helst verið best, um teir uml. 600 næmingarnir í 10. flokkunum í Føroyum høvdu verið savnaði í ein ella tveir fólkaskúlar, tí bert á tann hátt hevði tann einstaki næmingurin í størst møguligan mun fingið síni lærugreinaynski uppfylt. Ætlanin við at 10. flokkur skuldi verða heilt valfríur, var júst tann, at tann einstaki næmingurin skuldi í nógv størri mun enn áður kunna seta sína egnu útbúgving saman. Skal hetta eydnast er neyðugt við stórum skúlaeindum, antin sum skúlasamstarv ella við at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í einum stórum skúla.”

Byggideildin hevur kannað, hvat meirkostnaðurin verður, um ynski er at taka tríggjar 10. flokkar við í verkætlanina.

Sambært teimum fortreytum, sum higartil eru nýttar at meta um kostnaðar-karmin, sær ein øking soleiðis út sambært arkitektavirkinum Árni Winther:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Øking av víddini: | 75 næm. * 11 $m^2$ pr. næm. | = | 825 $m^2$ |
| Meirkostnaður: | 825 $m^2$ * 18.000 pr. $m^2$ | = | 14.85 mill. kr. |

Vit gera vart við, at hesin kostnaður má metast sum ein grundíløga til at hýsa 75 næmingum afturat. Vit hava ikki kannað serstøk krøv til 10. flokkar, heldur ikki hava vit verið í samband við arbeiðsbólkin hjá byggiharranum hesum viðvíkjandi.

Um ein so stór øking/broyting í verkætlanini skal gjøgnumførast, er sjálvsagt, at vit eiga at endurskoða skipanaruppskotið frá mai 2004.

Í skúlaárinum 2004/2005 eru 186 næmingar í 10. fl. Tað eru 26 næmingar (ein fl.) færri enn síðsta skúlaár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda fram við upprunaligu ætlanunum at byggja nýggjan 2-sporaðan skúla við Løgmannabreyt til 1.–9. flokk og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk vísandi til:

at fólkaskúlalógin frá 1997 mælir til størri skúlaeindir í 10. flokkunum, sum mentamálaráðið eisini mælir til.
at skúlastovur verða tøkar í Eysturskúlanum, tá ið næmingarnir í 8. og 9. flokki í Hoyvík og í Kollafirði í framtíðini ikki koma at ganga har.
at meirkostnaðurin verður umleið 15 mill. kr. um 10. flokkur verður við verkætlanini.
at neyðugt verður at endurskoða alt skúlaprojektið, sum aftur fer at hava við sær, at verkætlanin dregur út.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við byggiætlanini, men mælir til, at pláss eisini verður fyri 10. flokki.

Fyrst var atkvøtt um minnilutatilmæli hjá Høgna Mikkelsen sum fall við 1 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti. Fyri atkvøddi Høgni Mikkelsen. Ímóti atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup S. Joensen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Bjarti Mohr greiddi ikki atkvøðu.

Síðani var atkvøtt um tilmæli hjá Mentamálanevndini tann 30. juni 2004 sum var einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Árni Winther, arkitektur og Palli Henriksen, samskipari, kunnaðu um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um kostnaðin av skúlanum

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Bygginevndin kunnaði um kostnaðarmetingina, og hvussu langt arbeiðið er komið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum 5 fyritøkur. 4 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Tilboðini eru (uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 8.656.258,00 |
| H.V. Lútzen P/F | kr. 8.710.130,00 |
| P/F J. & K. Petersen | kr. 7.862.666,35 |
| Samtakið TH & ZRJ | kr. 7.067.578,00 |

Árni Winther, arkitektar, hava saman við Landsbyggifelagnum og Sofus M. Jacobsen kannað og eftirroknað tilboðini. Hesir meta samlaðu tilboðshæddina sum lága, men forsvarliga. Kostnaðarmetingin segði kr. 7.885.160,00.

Til kunningar verður sagt frá, at bygginevndin hevur samtykt at bjóða arbeiðið við skúlan út í tveimum umførum afturat: Rábygningur fyri seg og liðugtgeran fyri seg. Hetta verður gjørt fyri at fáa skúlan lidnan til tíðina, t.v.s., at projekteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Tilmæli**
Bygginevndin mælir til at taka av lægsta tilboði áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játtað kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25%.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Miðfyrisitingarstjórin var á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir til tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játta kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25% og beina málið í býráðið.

Nevndin harmast um at røtt mannagongd ikki er brúkt.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**
Vísandi til at verkætlanin at byggja nýggjan skúla við Løgmannabreyt, hevur verið boðin út millum fimm arbeiðstakarar at geva tilboð uppá, hevur bygginevndin at verkætlanini, havt samskifti við allar tilboðsgevararnar. Víðari hava umboð fyri bygginevndina og tekniski stjórin havt fundir við lægsta tilboðsgevaran fyri at kanna tilboðið nærri. Eisini hava ivamál frá báðum pørtum verið umrødd, og útgreinaði. Vísandi til hjálagda notat, ið er niðurstøðan hjá umboðunum hjá TK, j. Nr. 2004-0214/ dagfest Tórshavn 23. febr. 2007, mælir bygginevndin býráðnum, umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, til at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, longra byggitíðin uppá 30 mðr., áljóðandi kr. 98.271.956, uttan mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 7. mars 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 21. mars 2007:** Tekniski stjórin, býararkitekturin og bygginevndin kunnaðu mentamálanevndina um málið.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Bjørgfríð Ludvig, Jógvan Arge og Jan Christiansen mæla til at halda fast við síðstnevnda ískoyti, tó soleiðis at fyrivarni hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

Mikael H. Viderø, Ingibjørg Berg og Høgni Joensen mæla til at annulera lisitatiónina og bjóða arbeiðið út av nýggjum, har skúlin við Løgmannabreyt og Argja skúli verða boðin út saman í partalag.

**Mentamálanevndin 26. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, tó soleiðis at fyrivarni nr. 8 hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Útsett.

**Ískoyti**
Eftir fleiri samráðingarfundir millum kommununa og Sp/f Búsetur kann staðfestast, at grundarlag var ikki fyri at koma til eina semju um kapitalisering av fyrivarni nr. 8. Tórshavnar kommuna hevur síðani bjóða sær til at gera semju grunda á upprunaliga tilboði hjá Búsetur. Men heldur ikki tað hevur borið á mál, og á fundi hin 28. mars 2007

hevur Sp/f Búsetur boða borgarstjóranum frá, at teir ikki meta at møguligt er at koma til eina semju um ein sáttmála, og eru samráðingarnar sostatt endaðar úrslitaleysar.
Sostatt er talan um eina nýggja støðu.

Eftir samrøðu við tekniska stjóran mælir borgarstjórin til fyrst at annulerað útbjóðingina. Harnæst verður mælt til, at víðka um arbeiði við at gera vendipláss og busslummar á Løgmannabreyt til avseting av skúlabørnum v.m. og at gera ætlaða sparkivøllin sunnanfyri skúlan eisini, og at bjóða hetta út sum eitt samlað arbeiði í tveimum stigum, soleiðis at fyrsta stigi fevnir um eina prækvalifisering og næsta stigi fevnir um eina innbodna lisitatión millum teir tilboðsgevarar sum verða kvalifiseraðir, og at beina málið í mentamálanevndina, teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina til avgreiðslu.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt at viðgera mál nr. 42/07 sum seinasta mál, aftaná mál nr. 49.

Kl.20:20 bleiv fundurin niðurlagdur.

Kl. 20:24 fundur uppafturtikin.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmæli frá Leivur Hansen til býráðið um, at heita á borgarstjóran at halda ein fund afturat við Sp/f Búsetur, í eini roynd at finna eina semju í málinum, og at bygginevndin verður við á fundi.

**Mentamálanevndin: 23. apríl 2007:** Borgarstjórin greiddi frá, at hann eftir býráðsfundin 28. mars 2007, hevði fingið skriv frá Sp/f Búsetur, sum greiðir frá, at metingin, hann hevði havt av at samráðingarnar vóru endaðar úrslitaleyst, var grundað á misskiljing millum partarnar, og at samráðingar tískil framhaldandi eru millum partarnar.

Borgarstjórin og formaðurin í bygginevndini greiddu frá gongdini í málinum. Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2007:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Marin Katrina Frýdal og Hildur Eyðunsdóttir, vísa til tilmælið frá borgarstjóranum til býráðið tann 28. mars 2007 og mæla til, at taka undir við hansara tilmæli um at annulera útbjóðingina v.m., ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annika Olsen

Við støði í býráðssamtyktini 28. mars 2007, mælir borgarstjórin til at gera sáttmála og ískoytissáttmála nr. 1 við Sp/f Búsetur um bygging av skúla við Løgmannabreyt fyri tilsamans 107.456.475,00 kr. uttan mvg. Tilmælið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Játtaðar higartil eru 8,6 mió kr. til jørðarbeiði. Harafturat hevur býráðið samtykt at taka av tilboði uppá kr. 107.456.475,00 til høvuðsarbeiðstøkuna.

Afturat hesum kemur:

| | | |
|---|---|---|
| 1) Projekt, eftirlit og byggileiðsla | kr. | 12.353.846 |
| 2) Eykaðarbeiðir (-kend og ókend) og prísvøkstur, -mett | kr. | 14.485.855 |
| 3) Innbúgv íroknað tannlæknaserútgerð, -mett | kr. | 11.500.000 |
| 4) List og prýi (~1,5% av byggikostnaði) | kr. | 1.717.861 |
| 5) Jørð og íbindingargjøld, -fyribils | kr. | 4.995.965 |
| Samlað | kr. | 45.053.527 |
| Bygging (Jørðarbeiði og høvuðsarbeiðstøka) | kr. | 115.456.475 |
| Íalt fyri verkætlanina | kr. | 160.501.002 |

-*Neyvari útgreining verður framløgd á fundinum.*

Samlaða upphæddin fyri verkætlanina kemur sostatt uppá 160,5 mió.kr., og er fyriløgd bygginevndini t. 8. nov.´07.

Metingin og játtanin t. 30.juni 2004 byggir bert á byggikostnað íroknað projektering. Skulu tølini frá 2004 samanberast við innkomnu tilboðini íroknað projekt, eru samsvarandi upphæddir øktar úr 102 til 115 mió.kr. t.v.s. ein øking á góð 12%. Hesin

meirkostnaður er orsakað av hækkaðum kostnaðarstøði í millumliggjandi trimum árunum, umframt ta fermetra øking ið er ískoytt niðanfyri.

Tað verður viðmerkt, at hædd ikki er tikin fyri eykaðarbeiði, 14,5 mió.kr. í samanberingini. Orsøkin er, at henda óvissa eisini var galdandi tá upprunaliga mett var um kostnað.

Ískoyti: Vegna seinni tilkomin krøv og ynskir frá m.a. Mentamálaráðnum, Brunaumsjón Landsins, krøv til frítíðarskúlan og tænastudepil, umframt goymslur er víddin á skúlanum nú 6.200 fermetrar mótvegis 5.675 fermetrar í skipanaruppskotinum frá 2004, tó verður øll økingin ikki fult komplettera í fyrsta umfari, -men fyrireika er at ganga framtíðar krøvum á møti.

**Skúlin við Løgmannabreyt**

FÍGGJARTØRVUR juni 2007-2009

*Rev. Nov.´07*

| Skúlin við Løgmannabreyt: konto 1033-33010<br>Fíggjartørvur 2007-2009 | -brúkt higartil<br>1.000. kr. | 2007 rest<br>1.000. kr. | 2008<br>1.000. kr. | 2009<br>1.000. kr. | SUM<br>1.000. kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Bygging smbr. sáttmála, íroknað príshækkan 2,5% p.a. | 6.878 | 21.835 | 64.646 | 23.416 | 116.774 |
| Eykaðveitingar, kendar og ókendar, + 2,1 mió.kr. frá byggibúnan | 0 | 1.698 | 6.541 | 3.495 | 11.735 |
| Innbúgv, serútgerð tannlækni, list og serfyriskipan | 0 | 0 | 7.018 | 6.700 | 13.718 |
| Projekt, rest íroknað eftirlit og byggileiðslu | 8.354 | 1.065 | 2.482 | 1.387 | 13.287 |
| Jarðarkeyp og íbindingargjøld | | 4.996 | | | 4.996 |
| Árligur tørvur | 15.231 | 29.595 | 80.687 | 34.998 | 160.510 |

*GG: -allar upphæddir eru uttan MVG*

**Tilmæli:**
Mettur kostnaður fyri skúlan við Løgmannabreyt verður kr. 160.510.000,- umframt meirvirðisgjald.

Býráðið hevur higartil játtað kr. 8,1 mió uttan mvg, og tikið av sáttmálum afturat hesum fyri kr. 107.456.475 uttan mvg. Haraftrat verður roknað við 45.053.527 kr. til projekt, eftirlit, byggileiðslu, eykaarbeiðir, innbúgv, list, prýði, jørð og íbindingargjøld.

Bygginevndin mælir mentamálanevndini til at játta kr. 152.410.002 uttan mvg (107.456.475+45.053.527 kr) til byggingina og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 161.623.000 íroknað mvg sambært yvirliti yvir fíggjartørv, dagfest nov. 2007, av konto fyri íløgum.

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**181/07** **2007-3456**

**Konto 82 Umsiting av bygningum/onnur hús**

Við árslok 2006 er sambært síðu 227 í grannskoðanarprotokollini tkr. 4.756 fluttar fram til 2007 sum meirnýtsla at taka av játtanini 2007.

Higartil í 2007 hevur tørvurin av viðlíkahaldi og dagføring av teimum áleið 115 bygningunum, kommunan eigur veri størri og meira kostnaðar mikil enn upprunaliga mett.

Tekniski stjórin og kommunustjórin mæla til at hækka konto 82 við kr. 4.5 mió., og at hækka konto 89 skattainntøkur við kr. 4.5 mió. við teirri grundgeving, at vavið og tørvurin á dagføring og umvæling av bygningum hjá kommununi ikki rúmar omanfyrinevndu framflyting, um virksemið við bygningum ikki skal steðgast av øðrum myndugleikum.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |